Kunngerðablaðið A
2010 Hefti 13
ISSN 0907-905X

Nr. 46

12. mai 2010

**Kunngerð um broyting í kunngerð um tinglýsing**

§ 1

Í kunngerð nr. 63 frá 11. desember 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við kunngerð nr. 91 frá 28. november 1979, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 1.** Almenningurin hevur atgongd til tinglýsingarinnar bøkur og skjøl.“

2) Í § 1, stk. 3 verður „sorenskrivaraskrivstovuni“ broytt til „skrivstovuni hjá tinglýsingarmyndugleikanum“.

3) Í § 1, stk. 5 verður „sorenskrivaraskrivstovan“ broytt til „skrivstovan hjá tinglýsingarmyndugleikanum“.

4) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 2.** Skjøl til tinglýsingar verða latin inn gerandisdagar í seinasta lagi kl. 12.“

5) Í § 3 verður aftaná stk. 3 sett sum nýtt stk:
„*Stk. 4.* Verður eitt pantibræv áteknað, skal síðutalsmerkingin halda fram, og talið á síðum skrivast beint áðrenn hvørja undirskrift. Er pantibrævið á forprentaðum oyðublaði, skal síðutalsmerkingin halda fram á viðheftum ørkum.“
Stk. 4-7 verða hereftir stk. 5-8.

6) Í § 3, stk. 6 og § 16, stk. 1 verður „sorinskrivaranum“ broytt til: „tinglýsingarmyndugleikanum“.

7) Í § 3, stk. 6 og 7 og § 4, stk. 3 verður „landsstýrið“ broytt til: „landsstýrismaðurin“.

8) Í § 3, stk. 7 verður „á sýsluskrivstovunum“ broytt til „frá tinglýsingarmyndugleikanum“.

9) Í § 4, stk. 1, 2 og 3 verður „landsstýrinum“ broytt til: „landsstýrismanninum“.

10) Í § 6, stk. 1, § 14, § 36, stk. 1 og § 36, stk. 3 verður „sorinskrivarin“ broytt til: „tinglýsingarmyndugleikin“.

11) § 9 verður orðað soleiðis:
“**§ 9.** Tá sundurbýti verður loyvt, førir tinglýsingarmyndugleikin á blaðið í tingbókini hjá tí sundurbýtta eigindóminum tær broytingar, sum staðist hava av sundurbýtinum, haruppií matrikulfrámerki, støðd og tær serligu skyldur, sum sundurbýtisgóðkenningin møguliga hevur álagt einstøku lutum eigindómsins. Somu reglur eru galdandi, um sundurbýti ikki er farið fram, men matrikulfrámerki ella støðd eigindómsins eru broytt, ella um matrikulmyndugleikin áleggur eigindóminum serligar skyldur.”

12) Í § 10 verður „§ 22, stk. 5“ broytt til „§ 22, stk. 3“.

13) Kap. V.A. verður orðaður soleiðis:
„**Kap. V .A. Eigaraíbúðir og lutaíbúðir**
**§ 10 a.** Áðrenn ella samstundis sum fyrsta skeytið upp á íbúð verður tinglýst, skal tilmelding um sundurlegging av eigindóminum í eigaraíbúðir ella lutaíbúðir latast inn.
*Stk. 2.* Við tilmeldingini skal liggja yvirlit yvir íbúðirnar og kort yvir hvørja íbúð og avrit av hesum. Í yvirlitinum skal tilskilast:
a) Hvar íbúðirnar liggja, tilskilað við matr. nr., gøtunavni, húsanr., hædd v.m.
b) Nummar á íbúðunum.
c) Vídd á íbúðunum.
d) Býtistalið hjá eigaraíbúðunum, um so er, at tílíkt er ásett.
e) Áljóðandi virði á lutum í vanligum lutaíbúðafeløgum.
f) Ognarbrøkin fyri lutir í serstøkum lutaíbúðum.
*Stk. 3.* Bæði kortini yvir tær einstøku íbúðirnar og tær í stk. 2, litra a-c nevndu upplýsingar, skulu verða váttað av matrikulmyndugleikanum.

*Stk. 4.* Tær í stk. 2, litra e-f nevndu upplýsingar skulu verða váttaðar av skrásetingarmyndugleikanum.
*Stk. 5.* Tilmeldingin skal burturvísast, um so er, at tey fyriskrivaðu skjølini og váttanir ikki fylgja við ella eru ógreið.

**§ 10 b.** Á blað eigindómsins í tingbókini verður viðmerkt, at eigindómurin er býttur sundur í eigaraíbúðir ella lutaíbúðir, við tilskilan av tilmeldingardegi og íbúðatali. Avritið av yvirlitinum og avritini av kortunum verða løgd í aktina.

**§ 10 c.** Tá ið eitt skeyti upp á eigaraíbúð ella lutaíbúð verður tinglýst, fær íbúðin eitt serstakt blað í tingbókini (eigaraíbúðarblað ella lutaíbúðarblað), har tilskilað verður matr. nr. á eigindóminum, nummar á eigaraíbúðini ella lutaíbúðini, lega, stødd og býtistal, um tílíkt er ásett. Samstundis verður avritið av kortinum yvir eigaraíbúðina ella lutaíbúðini flutt til aktina hjá íbúðini.
*Stk. 2.* Servituttir, tyngsl, pantirættindi v.m., sum eru tilskilað á eigindómsblaðnum, verða flutt til eigaraíbúðarblaðið ella lutaíbúðarblaðið. Flytingin kann fara fram við einari stuttari ávísing til eigindómsblaðið.

**§ 10 d.** Eigaraíbúðarbløðini og lutaíbúðarbløðini verða sett í tingbókina í nummarrøð, annaðhvørt aftan á blað eigindómsins í tingbókini, ella í eina serstaka deild av hesi. Tær vanligu reglurnar um eigindómsbløð verða samsvarandi nýttar um eigaraíbúðarbløð og lutaíbúðarbløð.

**§ 10 e.** Tá ið broytingar verða tinglýstar, sum viðvíkja teimum í § 10 a, stk. 2 nevndu viðurskiftum, verða reglurnar í § 10 a, stk. 2-5 nýttar samsvarandi. Verða støddirnar á eigaraíbúðunum ella lutaíbúðunum broyttar, verða ásetingarnar í §§ 21-24. í tinglýsingarlógini samsvarandi nýttar.“

14) Í § 11, stk. 1, nr. 1 verða orðini „ella góðkent kalkerlørift“ strikað.

15) Í § 11, stk. 1, nr. 2, fyrsta punktum, verður „tilmeldarans navni og bústaði (skrivstovu)“ broytt til: navni, bústaði (skrivstovu) og telefonnummari tilmeldarans”.

16) Í § 11 stk. 1 verður nr. 3 strikað, og nr. 4 -11 verða hereftir nr. 3-10.

17) § 11, stk. 1, nr. 8, sum nú er nr. 7 verður orðað soleiðis:
„7) Tá ið flutningur av pantibrævi, ið er umfarsskjal, smbr. § 11 í lóg nr. 146 frá 13. apríl 1938 um skuldarbrøv, verður boðaður til tinglýsingar, skal flutningurin annaðhvørt verða skrivaður á skjalið ella fylgja við til at vísa fram fyri tinglýsingarmyndugleikanum. Tá tinglýst verður, fær skjalið átekning um, at flutningurin er lýstur. Sama er galdandi við øðrum átekningum um broytingar.“

18) Í § 11, stk. 1, nr. 11, og í § 16, stk. 1, nr. 6) verður: „matrikulstovan“ broytt til: „matrikulmyndugleikin“.

19) Í § 11, stk. 1, nr. 6 og § 37, stk. 1 verður „sorinskrivarans“ broytt til: „tinglýsingarmyndugleikans“.

20) § 12 verður orðað soleiðis:
“**§ 12.** Dagbókin verður førd av starvsfólkum hjá tinglýsingarmyndugleikanum.
*Stk. 2.* Í dagbókina verða tey skjøl førd, ið koma til tinglýsingar, men ikki samleikaprógv, ið bert skulu vísast fram, smbr. § 6.
*Stk. 3.* Dagbókin verður førd og endað hvønn gerandisdag.
*Stk. 4.* Dagbókin skal siga frá skjalsins slagi og navni og bústaði tilmeldarans, og skal harumframt innihalda hesar upplýsingar:

a) Skeyti (heimildarbrøv):
   1. Eigindómsins matr. nr.
   2. Møguligt nummar á eigaraíbúð ella lutaíbúð
   3. Adressan hjá matr.nr. (gøtunavn og húsanr.).
   4. Keypspeningur ella annað gjald.
   5. Keyparans og seljarans navn, og keyparans bústaður (um hesin ikki er almannakunnigur).
b) Pantibrøv, heruppií eisini skaðaloysisbrøv, í føstum eigindómi:
   1. Matr. nr. á eigindóminum
   2. Møguligt nummar á eigaraíbúð ella lutaíbúð.
   3. Adressan hjá matr.nr. (gøtunavn og húsanr.).
   4. Pantiupphæddin.
   5. Panthavarans navn og bústaður, um hesin ikki er almannakunnugur. Pantsetarans navn og bústaður.
c) Onnur skjøl viðvíkjandi føstum eigindómi:
   1. Matr. nr. á eigindóminum.
   2. Møguligt nummar á eigaraíbúð ella lutaíbúð.
   3. Møgulig peningaupphædd.
   4. Navn og føðingardagur hjá pørtunum.
d) Pantibrøv, herundir eisini skaðaloysisbrøv í leysafæ:
   1. Matr. nr. á eigindóminum.
   2. Møguligt nummar á eigaraíbúð ella lutaíbúð.
   3. Møgulig peningaupphædd.
   4. Navn hjá pørtunum.

e) Hjúnasáttmálar:
   1. Navn og bústaður partanna.
f) Onnur skjøl:
   1. Navn og bústaður partanna
   2. Møgulig peningaupphædd.

*Stk. 5.* Møguligar viðmerkingar verða førdar á serligum teigi.
*Stk. 6.* Beint verður fyri fullum dagbókum, tá 5 ár eru umliðin."

21) § 13 verður strikað

22) Í § 15, stk. 1, nr. 6, verður í staðin fyri: „úgevur" sett: „gevur út".

23) § 17 verður orðað soleiðis:
„**§ 17.** Áðrenn skeyti (heimildarbræv) aftaná sundurbýti verður ført í tingbókina, skulu hesar váttanir, árit og skjøl fyriliggja:
a) Váttan sambært § 22, stk. 1 í tinglýsingarlógini.
b) Skrivlig ella elektronisk kunning um sundurbýtisgóðkenningina og dagfesting hennara, um vídd ella markatal á tí frábýtta lutinum og serligar treytir, sum góðkenningin møguliga er gjørd við, smbr. løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m. § 21. Tinglýsingarmyndugleikin tryggjar, at samsvar er ímillum nevndu kunning og tingbók."

24) § 18, stk. 2, 2. pkt. verður strikað

25) Í § 18, stk. 3. verða orðini „burturvíst frá" broytt til: „strikað úr", og annað pkt. verður strikað.

26) § 18, stk. 4 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 4.* Hjá tinglýsingarmyndugleikanum verður førdur ein listi við fyribilslýstum skjølum við tilskilan av tilhoyrandi freistini."

27) § 21. verður orðað soleiðis:
„**§ 21.** Tingbókin verður førd av starvsfólkum hjá tinglýsingarmyndugleikanum."

28) Í § 29, stk. 2 og § 32, stk. 2 verða „skrivstovu sorenskrivarans" broytt til „skrivstovuni hjá tinglýsingarmyndugleikanum".

29) § 30, stk. 2. verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Persónsbókin verður førd av starvsfólkum hjá tinglýsingarmyndugleikanum."

30) § 34 verður stk. 1 strikað, og stk 2, sum hereftir verður stk. 1, verður at orða soleiðis: Øll hava rætt til eftir teimum reglum, sum ásettar eru, við skrivligari umsókn, har øll nøvn partanna og starv eru tilskilað, at fáa at vita, um hjúnasáttmáli er gjørdur, og um so er, nær og hvar hann er tinglýstur.

31) § 38 verður orðað soleiðis:
„**§ 38.** Tinglýsingarmyndugleikin kann biðja ein landmátara ella landmátteknikara frá matrikulmyndugleikanum um at gera metingina sambært § 23, stk. 2 í tinglýsingarlógini.
*Stk. 2.* Tann, ið ger metingina eftir stk. 1, skal tryggja sær, at panthavari ikki mótmælir henni. Hetta kann gerast skrivliga, umvegis teldupost ella telefon.
*Stk. 3.* Tílíkar váttanir mugu bert verða givnar, tá talan er um eitt, í mun til eigindómsins virði, lítið jarðarstykki."

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 12. mai 2010

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen (sign)

Nr. 47 26. mai 2010

# Løgtingslóg
# um
# dagføring av heilivágsframleiðsluni hjá Apoteksverkinum

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um innrætting av framleiðsluhølum og keyp av framleiðslutólum til dagføring av heilivágsframleiðsluni hjá Apoteksverkinum. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 15,5 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2011.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 117/2009

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 6, stk. 2 verða orðini „tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir“ broytt til: „tvær tíðindaredaksjónir“.

2) Í § 6, stk. 3 verður orðið „tíðindaeindunum“ broytt til: „tíðindaredaksjónunum“.

3) § 7 verður orðað soleiðis:
„**§ 7**. Øll húski í landinum hava skyldu at rinda Kringvarpi Føroya kringvarpsgjald. Kringvarpsgjaldið er áljóðandi kr. 2.900,00 um árið umframt meirvirðisgjald. Av hesi upphædd eru kr. 1.300,00 fyri útvarp og kr. 1.600,00 fyri sjónvarp, umframt meirvirðisgjald.
*Stk. 2.* Húskið eru hjún ella fólk, ið liva einsamøll ella saman í húsi ella íbúð, og børn teirra, sum búgva heima. Eldri fólk ella onnur, sum húskið tekur sær av, og sum hava fastan bústað hjá húskinum, verða roknað við í húskið.
*Stk. 3.* Skyldan at rinda kringvarpsgjald er eisini fyri tær bústaðareindir, ið fevna um fleiri fyribils ella fastar bústaðir í búfelagsskapum, á stovnum, sjúkrahúsum, gistingarhúsum o.l., og fyri virki, stovnar og onnur arbeiðspláss, har fleiri fólk eru í starvi, ella sum hava høli, har tikið verður ímóti viðskiftafólki. Landsstýrismaðurin ásetir gjøllari reglur um gjaldskylduna fyri bústaðareindir, virki, stovnar o.o.
*Stk. 4.* Kringvarp Føroya krevur inn kringvarpsgjaldið og kann í sambandi við innkrevjingina nýta skráir hjá Landsfólkayvirlitinum, Posta og SEV yvir húski. Framman fyri nevndu skráir kunnu einans nýtast í sambandi við innkrevjing og til tess at staðfesta, hvør kemur undir gjaldskyldu. Uppkrav um kringvarpsgjald verður sent hvørjum húski í landinum, bústaðareind, virki, stovni o.ø. sbrt. stk. 2 og 3. Ongum húski kann verða álagt at rinda meira enn eitt kringvarpsgjald.
*Stk. 5.* Húski, bústaðareindir, virki, stovnar o.o. sambært stk. 2 og 3 kunnu í eitt ávíst tíðarskeið verða frítikin fyri gjaldskylduna, um tey undirskriva eina váttan um, at tey ikki hava tól, sum kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya, tað veri seg í húsi/íbúð, í báti, í bili ella í summarhúsi. Landsstýrmaðurin ásetir neyvari reglur um tól, ið kunnu verða frítikin fyri gjaldskyldu, og hvørjar umstøður kunnu gera seg galdandi fyri, at Kringvarp Føroya kann frítaka fyri gjaldskyldu.
*Stk. 6.* Tann, sum er frítikin fyri gjaldskylduna sbrt. stk. 5, hevur skyldu at boða Kringvarpi Føroya frá, um viðurskifti, sum váttanin sbrt. stk. 5 fevnir um, verða broytt.
*Stk. 7.* Veitarar av fjarskiftistænastum hava skyldu til eftir áheitan frá Kringvarpi Føroya at lata Kringvarpi Føroya upplýsingar av týdningi fyri spurningin, um húski, bústaðareindir, virki, stovnar o.o. hava tól, sum kann móttaka sendingar frá Kringvarpi Føroya. Framman fyri nevndu upplýsingar kunnu einans nýtast í sambandi við innkrevjing og til tess at staðfesta, hvør kemur undir gjaldskyldu.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um gjaldskylduna sbrt. stk. 1 og 2, hvør í húskinum skal rinda kringvarpsgjaldið, nær gjaldskyldan byrjar og endar. Somuleiðis verða ásettar reglur um uppkrav av kringvarpsgjaldi og um afturrindan av ov nógv inngoldnum kringvarpsgjaldi, um avgreiðslugjald og eykagjald fyri ov seint goldið kringvarpsgjald og støddina á hesum gjøldum.
*Stk. 9.* Øll krøv eftir hesi grein kunnu, saman við innkrevjingarkostnaði, verða innheintað við panting.
*Stk. 10.* Innheintingarreglurnar eftir hesi grein verða eisini at nýta í sambandi við innheinting av krøvum til Kringvarp Føroya, sum stava frá tíðini, áðrenn henda lóg kom í gildi.“

4) § 9, stk. 4 verður strikað.

5) Í § 24, stk. 1 verður aftan á „§ 2, stk. 4“ sett: „§ 7, stk. 5, 6 og stk. 7“

### § 2

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Kunngerð nr. 124 frá 21. desember 2006 um kringvarpsgjald er í gildi, til nýggj kunngerð um kringvarpsgjald verður sett í staðin.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 160/2

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 171 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Aftaná § 2, stk. 4 verður sett inn:
„*Stk. 5.* Til bygging av bústaði ella bústaðaeind sambært stk. 1, nr. 2, litra a og b kann stuðul verða veittur fyri rentuútreiðslur í byggitíðini, tó í mesta lagi fyri tey síðstu 2 árini innan innflyting, og útgjald av hesum kann ikki fara fram innan innflyting. Stuðul kann tó ikki veitast til meira enn ein bústað fyri sama tíðarskeið, og er hetta eisini galdandi fyri sambúgvandi persónar uttan mun til, um ein ella báðir eiga bústaðin.“

2) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Fyri tey lán, sum eru nevnd í § 2, stk. 1, nr. 2, litra a, verður árligi rentustuðulin í mesta lagi tann í § 5 nevnda prosentupphædd av kr. 150.000 pr. matrikkulnummar uttan mun til, um ein ella fleiri persónar eiga bústaðin. Eigaraíbúð er í hesum sambandi at javnmeta við matrikulnummar.“

3) Í § 8 a, stk. 1 verður „kommunalu skattakærunevndina“ broytt til:
„Skatta- og avgjaldskærunevndina“, stk. 2 verður strikað, og í stk. 3 verður „og 2“ strikað.
Stk. 3 verður hereftir stk. 2.

4) Í § 10 a verður „Toll-og Skattstova Føroya“ broytt til: „TAKS“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 167/2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5 verður „§ 7, nr. 3“ broytt til: „§ 7, nr. 2“.

2) Í § 8, nr. 2 verður „§ 7, stk. 1, nr. 3“ broytt til: „§ 7, nr. 2“.

3) § 12 b verður strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 2010.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 112/2009

# Løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 17 verður aftaná stk. 1 sett:

„*Stk. 2.* Stuðul sambært stk. 1 fevnir ikki um útreiðslur til heilivág."

2) § 18 c verður strikað.

3) Í § 33, stk. 4 verður „§ 18 c," strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 2010. § 1, nr. 2 og 3 koma tó í gildi 2. apríl 2010.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 125/2009

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kolvetnisvirksemi

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 7 verða sum nýggj stk. 3–4 sett:
„*Stk. 3.* Um umsókn er komin um at veita loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, sbr. § 6, stk. 1, uttan at alment er lýst eftir umsóknum sbrt. stk. 1, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd, kann landsstýrismaðurin hóast stk. 1-2 taka eina slíka umsókn til viðgerðar. Loyvi kann bert verða givið, aftaná at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og hvat øki søkt verður um. Onnur áhugað kunnu søkja um loyvi til sama øki ella partar av hesum við eini freist upp á í minsta lagi 90 dagar frá tí, at lýst varð.
*Stk. 4.* Loyvi eftir mannagongdini í stk. 3 kann bert verða givið til øki, sum eru ásett sbrt. stk. 2 í løgtingslógunum um fyrsta, annað og triðja útbjóðingarumfar.“
Stk. 3-4 verða hereftir stk. 5-6.

2) Í § 7, stk. 3, sum hereftir verður stk. 5, verða orðini „eftir almenna lýsing“ strikað.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 150/2009

# Løgtingslóg
# um
# einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1
## Veitan av einkarætti

**§ 1.** Endamálið við hesi løgtingslóg er at áseta karmarnar fyri einum tíðaravmarkaðum einkarætti til at byggja, reka og fíggja ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð.

**§ 2.** Landsstýrismanninum verður heimilað at lata P/F Skálafjarðartunlinum ein tíðaravmarkaðan einkarætt til fyri egna rokning og váða at byggja, reka og fíggja ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð. Tunnilin skal
knýta Suðurstreymoy saman við suður Eysturoy.
*Stk. 2*. Einkarætturin skal verða latin P/F Skálafjarðartunlinum í seinasta lagi tann 1. desember 2010.
*Stk. 3.* Um landsstýrismaðurin ikki nýtir heimildina at geva P/F Skálafjarðartunlinum einkarættin áðrenn tann 1. november 2010, fellur heimildin burtur, uttan so at landsstýrismaðurin í staðin ger av at bjóða út einkarættin í fríari kapping, við tí endamáli at geva øðrum einkarættin.
Um so er, verður landsstýrismanninum heimilað at gera ein sáttmála um einkarætt við tann, sum út frá einari samlaðari meting má metast at hava givið besta tilboðið.
*Stk. 4.* Einkarætturin verður veittur sambært treytum, ásettar í sáttmála millum landsstýrismannin og tann, sum fær einkarættin.
*Stk 5.* Einkarætturin verður treytaður av, at landsstýrið fær endurrindað kostnaðin í sambandi við fyrireiking og gerð av sáttmálanum um einkarætt, innan fyri eina upphædd upp á ávikavist 10 mió. kr. og 15 mió. kr., treytað av, um einkarætturin verður veittur P/F Skálafjarðartunlinum ella øðrum sambært § 2, stk. 3.

## Kapittul 2
## Vavið av einkarættinum

**§ 3.** Hann, sum fær einkarættin, kann fyri egna rokning og váða prosjektera, byggja, reka, viðlíkahalda og fíggja tunnilin. Hann hevur somuleiðis rætt og skyldu til at krevja gjald frá teimum, ið nýta tunnilin, samsvarandi meginreglunum í hesi løgtingslóg og treytunum í sáttmálanum um einkarættin.

**§ 4.** Einkarætturin avmarkar ikki rættin hjá landsstýrinum at gera aðrar útbyggingar av infrakervinum.
*Stk. 2.* Landsstýrið hevur tó skyldu at halda honum, sum fær einkarættin, skaðaleysan fyri tapum, ið beinleiðis standast av ítøkiligum verkætlanum, ið eru í kapping við tunnilin, og sum hava við sær, at ferðslan í tunlinum minkar ella veksur minni enn væntað. Tapið verður staðfest við støði í miðaltalinum fyri ferðsluna tað seinasta árið, áðrenn verkætlanin varð framd, og miðaltalinum fyri ferðsluna árið eftir.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í 2. stk. fevna ikki um:
1) Fyribils broytingar í infrakervinum, orsakaðar av vanligum viðlíkahaldi av vegum, tunlum o.l.
2) Útbyggingar av verandi vegakervi so sum breiðkan av vegum v.m.
3) Verkætlanir, sum landsstýri hevur ætlanir um at fremja tey næstu árini.
4) At skipa verður fyri almennum ella privatum ferðasambandi gjøgnum tunnilin.

## Kapittul 3
## Avhendan av einkarættinum

**§ 5.** Hann, sum hevur fingið einkarættin, kann avhenda hann.
*Stk. 2.* Uttan so, at onnur avtala er gjørd við landsstýrismannin, kann einkarætturin tó ikki avhendast fyrr enn 2 ár eftir dagin, at tunnilin er tikin í nýtslu og hevur verið rikin á nøktandi hátt.
*Stk. 3.* Hann, sum hevur ella fær einkarættin, skal til eina og hvørja tíð víkja fyri rættindunum hjá landinum sambært sáttmálanum um einkarætt.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin skal kunnast, áðrenn einkarætturin verður avhendaður, og kann, tá ið serligar orsøkir eru til at ivast í fíggjarliga ella fakliga førleikanum hjá tí, sum fær einkarættin, nokta fyri einari og hvørjari avhendan.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann somuleiðis nokta at góðkenna eina avhendan av einkarættinum, um so er, at landsstýrið sjálvt ætlar at taka yvir tunnilin samsvarandi treytunum í sáttmálanum um einkarætt.
*Stk. 6.* Um so er, at landsstýrismaðurin ætlar at nokta fyri einari avhendan sambært stk. 4 og stk. 5, skal hann boða frá hesum í seinasta lagi 3 mánaðir aftan á, at tann, sum hevur einkarættin, skrivliga hevur kunnað landstýrismannin um ætlaðu avhendanina.
*Stk. 7.* Um so er, at val er útskrivað til Løgtingið, tá ið avhendanin verður fráboðað, ella um val verður útskrivað teir komandi 3 mánaðirnar, verður freistin longd við 1 mánaða.

## Kapittul 4
## Einkarætturin fellur burtur

**§ 6.** Rætturin til at byggja og reka tunnilin fellur burtur, um so er, at arbeiðið at gera tunnilin ikki er byrjað í seinasta lagi 2 ár aftan á dagfestingina av sáttmálanum um einkarættin. Landsstýrismaðurin kann tá gera av at bjóða út alment einkarættin við tí endamáli at gera sáttmála við annan sáttmálapart sbrt. treytunum í § 2, stk 3.

*Stk 2.* Hetta er tó ikki galdandi, um so er, at orsøkin til, at arbeiðið ikki er byrjað, er orsakað av force majeure. Um so er, at force majeure verður staðfest, verður freistin longd samsvarandi tíðarskeiðinum, sum force majeure hevur verið galdandi, tó ikki í meira enn 12 mánaðir.

*Stk. 3.* Partarnir kunnu avtala at leingja freistina, um so er, at serlig viðurskifti gera seg galdandi.

*Stk. 4.* Heldur einkarætturin uppat, rindar hann, sum hevur einkarættin, sjálvur allar útreiðslur, sum hann hevur havt orsakað av verkætlanini.

*Stk 5.* Fellur einkarætturin burtur, hevur landsstýrið heilt ella lutvís rætt til at taka yvir úrslitið av kanningum o.ø í sambandi við byggingina av tunlinum afturímóti at rinda eina rímiliga fíggjarliga samsýning.

*Stk 6.* Um so er, at verkætlanin verður framd, áðrenn 4 ár frá tí, at einkarætturin fellur burtur av landsstýrinum sjálvum ella av øðrum enn honum, sum upprunaliga fekk einkarættin, og úrslitini av kanningum hjá honum, sum upprunaliga fekk einkarættin, í meira enn í minni mun mugu metast at hava verið viðvirkandi í hesum sambandi, skal landsstýrið halda hann skaðaleysan fyri allan kostnað í sambandi við verkætlanina, innan fyri eina mestu upphædd upp á 25 mió. kr.

*Stk 7.* Ásetingin í stk. 6 er tó ikki galdandi, um so er, at einkarætturin er hildin uppat, orsakað av umstøðum, sum nevndar eru í § 8 í hesi lóg.

*Uppathald av einkarættinum*

**§ 7.** Einkarætturin heldur uppat samstundis, sum tunnilin verður avhendaður til landsstýrið, sbr. meginreglurnar í § 9, stk. 1.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann taka einkarættin aftur, um so er, at tann, sum hevur einkarættin, grovt ella fleiri ferðir setir sínar skyldur sambært hesi løgtingslóg og sáttmálanum um einkarættin til viks.

*Stk. 2.* Um so er, at einkarætturin verður tikin aftur, fellur tunnilin til landsstýrið í samsvari við treytirnar í sáttmálanum um einkarættin.

## Kapittul 5
## Meginreglur fyri einkarættinum

**§ 9.** Einkarætturin verður veittur innan fyri hesar karmar og tekur støði í hesum meginreglum:

1) Tunnilin verður gjørdur og rikin sum ein gjaldsvegur og verður fíggjaður av honum, sum fær einkarættin, uttan váða og uttan veðhald, herundir fíggjarligt veðhald frá landsstýrinum.
2) Tunnilin verður rikin sambært vanligum marknaðartreytum við fríari prísáseting, samstundis sum atlit verða tikin til at fáa eitt gott og fíggjarligt atkomuligt infrakervi, grundað á umhvørvisvinarligar burðadyggar treytir, møguliga við ymsum sløgum av gjøldum.
3) Tunnilin verður latin landsstýrinum, tá ið samlaði kostnaðurin av verkætlanini er afturgoldin, og tá ið hann, sum hevur fingið einkarættin, hevur fingið eitt avtalað avkast av síni íløgu.
   Avkastið verður ásett við grundarlagi í marknaðartreytunum og við atliti at váðanum av íløguni hjá honum, sum fær einkarættin. Avtala verður gjørd við hann, sum fær einkarættin, at tunnilin skal latast landsstýrinum aftur aftan á eitt ávíst áramál uttan mun til, um hann tá ikki hevur fingið tað avtalaða avkastið av síni íløgu.
   Avtala kann tó verða gjørd um at leingja hetta áramál, um so er, at serligar umstøður gera seg galdandi.
4) Tunnilin verður latin aftur uttan kostnað og uttan skuld og aðrar byrðar.
5) Landsstýrismaðurin hevur í øllum tíðarskeiðnum, har einkarætturin er galdandi, rætt til við ávísum varsli at keypa tunnilin samsvarandi ásettu treytunum í sáttmálanum um einkarættin.
6) Landsstýrismaðurin skal góðkenna endaligu tunnilsverkætlanina, áðrenn farið verður undir arbeiðið at gera tunnilin. Somuleiðis skal landsstýrismaðurin góðkenna tunnilin, áðrenn hann verður tikin í nýtslu.
7) Hann, sum fær einkarrættin, skal til eina og hvørja tíð tryggja persónar, ognarlutir o.a. í sambandi við verkætlanina á nøktandi hátt.
8) Hann, sum fær einkarættin, hevur skyldu til at tryggja eina effektiva og fíggjarliga ábyrgdarfulla stýring av verkætlanini, bæði í byggitíðarskeiðnum og í rakstrartíðarskeiðnum.
9) Tunnilin skal í einum og hvørjum lúka treytir í galdandi lóggávu og normum.

*Stk. 2.* Tær meginreglur, ið eru ásettar omanfyri, verða ásettar nærri í sáttmálanum um einkarættin.

## Kapittul 6
## Skattur, avskrivingar og meirvirðisgjald

**§ 10.** Frá og við árinum, tá tunnilin verður latin upp fyri ferðslu, hevur hann, sum fær einkarættin, við grundarlagi í útveganarkostnaðinum rætt til skattligar avskrivingar samsvarandi reglunum um vinnuligar bygningar. Við útveganarkostnaðin skilst tær samlaðu byggiútreiðslurnar til vegir og tunnilsgerð v.m.

*Stk. 2.* Rættin til skattligar avskrivingar hevur tann, sum hevur fingið einkarættin. Hann kann ikki nýta møguligt skattligt undirskot, sum er avleitt av tunnilsverkætlanini, í felagnum, sum hevur fingið tillutað einkarættin, við samskatting við onnur feløg. Tað sama ger seg galdandi við møguligum yvirskoti.

**§ 11.** Virksemið hjá honum, sum hevur fingið einkarættin, er meirvirðisgjaldskyldugt. Hann, sum hevur fingið einkarættin, hevur rætt til endurrindan av útgangandi meirvirðisgjaldi og skyldu at avrokna inngangandi meirvirðisgjald. Tað er ein treyt, at tunnilsgjaldið er meirvirðisgjaldskyldugt. Hækkar meirvirðisgjaldið fyri nýtslu av tunlinum, hevur felagið rætt til endurgjald fyri skjalprógvað tap, um so er, at tapið kann staðfestast sum fylgja av hækkingini av meirvirðisgjaldinum, og at úrslitið av hesum er minni ferðsla sbr. § 4, stk. 2.

**Kapittul 7**
**Vegstøða og linjuføring**

**§ 12.** Tunnilin er ikki partur av landsveganetinum sambært løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin hevur tó tær heimildir, sum eru ásettar í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum og í løgtingslóg nr. 14 frá 2. mars 1988 við seinni broytingum um ferðslu, vegum og tunlum viðvíkjandi.
*Stk. 3.* Skelti- og avmerking skal gerast samsvarandi galdandi kunngerð og ferðsluavmerkingar. Øll skelting og vegavmerking skal góðkennast av ferðslumyndugleikanum og landsvegamyndugleikanum.
*Stk. 4.* Tann, sum hevur fingið einkarættin, hevur rætt til uttan viðurlag at hava tunnilin íbundnan í almenna veganetið.
*Stk 5.* Við íbinding í landsvegin skal hann, sum hevur fingið einkarættin, gera og avhalda útreiðslurnar fyri møguliga umlegging av landsveganetinum. Hann, sum hevur fingið einkarættin, skal rinda fyri íbindingar uttan mun til, um tað er rundkoyring ella onnur íbinding. Um so er, at íbindingin kemur inn í landsveg, verður íbindingin partur av landsvegnum, og ongarrætturin fellur til landsstýrið.

**§ 13.** Tunnilin verður lagdur sambært linjuføring norðan fyri Tórshavn við rundkoyring, har annar armurin kemur út í Runavík og hin á Strondum.

**Kapittul 8**
**Ognartøka**

**§ 14.** Landsstýrismaðurin kann ognartaka neyðugt lendi ella tilfar fyri at fremja verkætlanina, um so er, at semja ikki verður fingin við teir, sum hava rættindir yvir lendinum ella tilfarinum.
*Stk. 2.* Ongartøka verður gjørd móti fullum endurgjaldi.
*Stk. 3.* Ognartøka verður framd sambært “lov nr. 69 frá 7. mai 1881 om forpligtigelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne”.
*Stk. 4.* Landsstýrið skal avhenda tað ognartikna til hann, sum hevur fingið einkarættin, fyri útveganarkostnað.

**Kapittul 9**
**Upplýsingar frá Akstovuni**

**§ 15.** Hann, sum hevur fingið einkarættin, hevur rætt til uttan viðurlag at fáa upplýsingar frá Akstovuni um brúkarar og ánarar av akførum við tí endamáli at krevja inn gjald fyri nýtslu av tunlinum.

**Kapittul 10**
**Gildiskoma**

**§ 16.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 161/2009

Nr. 54 26. mai. 2010

# Eykajáttanarløgtingslóg

# fyri

# mai 2010

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

# § 3. Fíggjarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 10.700 | 10.700 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | **700** | **-** |
| 3.18.1. Tænastumannaeftirlønir............................................... | | 700 | - |
| **Íbúðarmál** | | **10.000** | **-** |
| 3.22.4. Útgjaldsskipanir............................................... | | 10.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **3.18.1. Tænastumannaeftirlønir** | | | |
| 18.1.01. Tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin j.) | J: | 21.000 | 50 |
| | **EYJ:** | **700** | **-** |
| **3.22.4. Útgjaldsskipanir** | | | |
| 22.4.04. Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | J: | 20.000 | - |
| | **EYJ:** | **10.000** | **-** |

# § 5. Fiskivinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -12.000 | -12.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Fiskivinna** | | **-12.000** | **-** |
| 5.34.4. Studningur til vinnur............................................... | | -12.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **5.34.4. Studningur til vinnur** | | | |
| 34.4.01. Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin j.) | J: | 42.000 | - |
| | **EYJ:** | **-12.000** | **-** |

# § 6. Vinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løgu ætlan | -50 | - | 50 |
| **Samferðsla og samskifti** | | **-** | **50** |
| 6.38.2. Samferðsla.............................................. | | - | 50 |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **6.38.2. Samferðsla** | | | |
| 38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løguj.) | J: | 4.700 | - |
| | **EYJ:** | **-** | **50** |

# § 7. Mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 18.635 | 18.635 | - |
| Løgu ætlan | -8.000 | -8.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **18.635** | **-** |
| 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar............................................... | | 5.915 | - |
| 7.23.6. Hægri útbúgvingar og | | 6.920 | - |
| 7.23.7. Lestrarstuðul............................................... | | 5.800 | - |
| **Mentan** | | **-8.000** | **-** |
| 7.24.6. Ítróttur.............................................. | | -8.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **7.23.3. Miðnámsútbúgvingar** | | | |
| 23.3.05. Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarj.) | J: | 175.040 | - |
| | **EYJ:** | **5.915** | **-** |
| **7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking** | | | |
| 23.6.24. ES-gransking (Stuðulsj.) | J: | - | - |
| | **EYJ:** | **6.920** | **-** |
| **7.23.7. Lestrarstuðul** | | | |
| 23.7.04. Lestrarstuðul (Lógarbundin j.) | J: | 108.527 | 1.020 |
| | **EYJ:** | **5.000** | **-** |
| 23.7.05. Lestrarlán (Stuðulsj.) | J: | 11.250 | 9.300 |
| | **EYJ:** | **800** | **-** |

**7.24.6. Ítróttur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.6.13. Ítróttarhøll á Sandoynni (Løguj.) | J: | 10.000 | - |
| | **EYJ:** | **-8.000** | **-** |

# § 11. Heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 27.727 | 27.727 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Heilsumál** | | **27.727** | **-** |
| 11.20.2. Heilsutænastur............................................... | | 27.127 | - |
| 11.20.3. Sjúkrahúsverkið............................................... | | 600 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.2. Heilsutænastur** | | | |
| 20.2.03. Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarj.) | J: | 108.670 | - |
| | **EYJ:** | **27.277** | **-** |
| 20.2.04. Kommunulæknaskipanin (Rakstrarj.) | J: | 11.483 | - |
| | **EYJ:** | **-150** | **-** |
| **11.20.3. Sjúkrahúsverkið** | | | |
| 20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarj.) | J: | 48.401 | - |
| | **EYJ:** | **600** | **-** |

# § 12. Almannamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -27.316 | -27.126 | 190 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **300** | **-** |
| 12.11.1. Fyrisiting............................................... | | 300 | - |
| **Almannamál** | | **-27.426** | **190** |
| 12.21.1. Fyrisiting............................................... | | 450 | - |
| 12.21.3. Barnastuðul............................................... | | 1.690 | 190 |
| 12.21.6. Eldri og brekað............................................... | | -1.512 | - |
| 12.21.7. Sosialar skipanir............................................... | | -14.353 | - |
| 12.21.8. Sosialar pensjónir............................................... | | -13.701 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **12.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.26. Almannamálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 10.748 | - |
| | **EYJ:** | **300** | **-** |
| **12.21.1. Fyrisiting** | | | |
| 21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin (Rakstrarj.) | J: | 7.131 | - |
| | **EYJ:** | **450** | **-** |
| **12.21.3. Barnastuðul** | | | |
| 21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin j.) | J: | 7.410 | 1.300 |
| | **EYJ:** | **1.190** | **190** |
| 21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin j.) | J: | 817 | - |
| | **EYJ:** | **500** | **-** |
| **12.21.6. Eldri og brekað** | | | |
| 21.6.01. Serforsorg (Rakstrarj.) | J: | 171.041 | - |
| | **EYJ:** | **-750** | **-** |
| 21.6.04. Eldrarøkt (Rakstrarj.) | J: | 324.048 | - |
| | **EYJ:** | **-762** | **-** |
| **12.21.7. Sosialar skipanir** | | | |
| 21.7.01. Vanlig forsorg (Lógarbundin j.) | J: | 173.833 | 5.035 |
| | **EYJ:** | **-14.353** | **-** |
| **12.21.8. Sosialar pensjónir** | | | |
| 21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | J: | 415.686 | - |
| | **EYJ:** | **-8.584** | **-** |
| 21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin j.) | J: | 267.884 | - |
| | **EYJ:** | **-5.117** | **-** |

# § 15. Innlendismál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -2.100 | 1.400 | 3.500 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-700** | **3.500** |
| 15.11.1. Fyrisiting............................................. | | -700 | 3.500 |
| **Samferðsla og samskifti** | | **2.100** | **-** |
| 15.38.1. Vegir og havnir............................................. | | 2.100 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **15.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.39. Innlendismálaráðið (Rakstrarj.) | J: | 14.115 | - |
| | **EYJ:** | **1.400** | **3.500** |
| 11.1.56. Umvæling av almennum bygningum (Løguj.) | J: | 17.000 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **EYJ:** | **-2.100** | **-** |

### 15.38.1. Vegir og havnir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.1.07. Nýggir landsvegir (Løguj.) | J: | 20.700 | 100 |
| | **EYJ:** | **3.000** | **-** |
| 38.1.14. Havnir (Løguj.) | J: | 2.000 | - |
| | **EYJ:** | **-900** | **-** |

# § 20. Inntøkur

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -7.506 | 2.494 | 10.000 |
| Løgu ætlan | - | - | - |
| **Skattir og avgjøld** | | **2.494** | **10.000** |
| 20.52.2. Avgjøld og tollur............................................... | | - | 10.000 |
| 20.52.5. Flyting frá øðrum greinum............................................... | | 2.494 | - |

## B. Játtanir

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### 20.52.2. Avgjøld og tollur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 52.2.01. Meirvirðisgjald ................................................................. | J: | 90.000 | 1.240.000 |
| | **EYJ:** | **-** | **10.000** |

### 20.52.5. Flyting frá øðrum greinum

| | | | |
|---|---|---|---|
| 52.5.01. Endurrindan av keyps-MVG | J: | 140.000 | - |
| | **EYJ:** | **2.494** | **-** |

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 174/2009

**Løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 56 frá 9. juni 2008 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** **„**Allastaðni í lógini verður“ „lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme“, sum lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan frá 2008“ broytt til: „„„lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme“, sum lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan“.

**2.** Í § 1, stk. 1, nr. 4 verður eftir „1- 3“ sett: „5 og 6“.

**3.** Í § 1 verður eftir stk. 1 sett sum nýtt stk. „*Stk. 2.* Ásetingin í § 2 í hesi lóg verður nýtt fyri tey, sum handla við lutum og uppboðssøluhaldarar“
Stk. 2 verður síðani stk. 3.

**3.** Í § 3, stk. 1 verður "§§ 6-30" broytt til: "§§ 3 og 6-30".

**4.** Eftir § 5 verður sett inn nýggj grein 5a, sum verður soljóðandi:
**„§ 5a**. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvat skal skiljast við „politisk udsatte personer“ í § 3, stk. 1, nr. 6 í „lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme“, sum lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan, jbr. tilvísing í § 3, stk 1 í hesi lóg.“

**5.** Í § 16, stk. 2 verður „á eina meting av vandanum fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi“ broytt til: „váðameting“.

**6.** Í § 16 verður eftir stk. 4 sum nýtt stk. sett:
„*Stk. 5.* Skráseting Føroya kann áleggja virkjum og persónum, sum eru nevnd í stk. 1, innanfyri eina freist, sum skrásetingin hevur ásett, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á hvítvaskløgtingslógina og tær reglur, sum eru ásettar smbrt. lógini „lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler“.
Stk. 5 verður síðani stk. 6.

**7.** Í § 18, stk. 2 verður eftir „Tryggingareftirlitinum“ sett: „til tess at kunna útinna hetta virksemi“.

**8.** Í § 18 verða eftir stk. 2 sum nýggj stk. sett:
„*Stk. 3.* Tryggingareftirlitið skal sýta at skráseta teir í stk. 2 nevndu persónar og virkir, um nevndu persónar ella limir í leiðsluni ella veruligu eigarar av virkinum eru dømd fyri revsiverd viðurskifti, og hesi viðurskiftini grunda stóran vanda fyri misnýtslu av starvinum ella arbeiðinum. Revsilógarinnar § 78, stk. 3 verður nýtt samsvarandi.
*Stk. 4.* Tryggingareftirlitið skal strika úr skránni teir í stk. 2 nevndu persónar og virkir, um nevndu persónar ella limir í leiðsluni ella veruligu eigarar av einum skrásettum virki eru dømdir fyri revsiáløgd viðurskifti og hesi viðurskiftini grunda stóran vanda fyri misnýtslu av starvinum ella arbeiðnum. Revsilógarinnar § 78, stk. 3 verður nýtt samsvarandi“.
Stk. 3-5 verða síðani stk. 5-7.

**9.** § 18, stk. 5, sum verður stk. 7, verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Tryggingareftirlitið kann áleggja teimum virkjum og persónum, sum eru nevndir í stk. 1, innanfyri eina freist, sum Tryggingareftirlitið hevur ásett, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á hvítvaskløgtingslógina, tær reglur, sum eru ásttar smbrt. lógini ella "lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler“.

**10.** § 20, stk 1 verður orðað soleiðis:
**„§ 20.** Tilætlað brot ella brot av grovum ósketni á § 2, § 9, 2. pkt., § 15, stk. 1, § 16, stk. 3, § 18, stk. 2 og 3 í hesi løgtingslóg; á § 6, stk. 2, § 7, stk. 1, 2. pkt., stk. 3 og stk. 4, 1. pkt., § 11, § 12, stk. 1-6, § 13, stk. 1, 1. og 3. pkt., stk. 2, § 14, § 15, stk. 1, 1. pkt., § 15, stk. 2, § 19, stk. 1, stk. 2, 1. pkt. og stk. 3-5, § 23, stk. 1, 1. pkt., stk. 2 og stk. 3, 1. pkt., § 24, § 25, stk. 1-3, § 27, stk. 1, § 30, 2. pkt. og § 34, stk. 3, í „lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme“, sum lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, verður revsað við bót. Tilætlað brot, ella brot av grovum ósketni á § 35, stk. 2 í „lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme“, sum

lógin er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, verður revsað við bót uttan so, at harðari revsing er ásett eftir tí fyri Føroyar galdandi revsilóg".

**11.** Í § 20, stk. 4 verður „§ 18, stk. 3" broytt til: „§ 18, stk. 5".

**12.** Í „§ 20, stk. 5 verður „§ 18, stk. 5" broytt til „§ 18, stk. 7".

**13.** Sum skjal til lógina verður sett:

**Skjal 1**

3. Móttøka av innlánum og aðrari ogn, sum skylda er at afturrinda
4. Útlánsvirksemi, heruppií
   - forbrúkarakredittir
   - realkreditlán
   - factoring og diskontering
   - handilskredittir, heruppií forfaitering
7. Fíggjarlig leasing
8. Útgáva og umsiting av gjaldmiðlum (kreditkort, ferðakekkar, bankaveklsar)
9. Borgan og trygdir
10. Transaksjónir fyri egnu ella kunda rokning viðvíkjandi
    - peningamarkanaðarinstumentum (kekkar, vekslar, innskotsprógv o.a)
    - gjaldoyramarknaðinum
    - fíggjarligum futures og opsjónum
    - gjaldoyra- og rentuinstumentum
    - virðisbrøvum
13. Viðvirkan til útgávu av virðisbrøvum (emmissión) og tænastuveitingar í tí sambandinum
14. Ráðgeving til virkir viðvíkjandi kapitalstrukturi, ídnaðarstrategi og tílíkum spurningum og ráðgeving og tænastuveitingar viðvíkjandi samanlegging og keypi av virkjum
15. Peningaformidling (money broking)
16. Porteføljuumsiting og – rágeving
17. Varðveitsla og umsiting av virðisbrøvum
18. Boksútleigan

**§ 2**

Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 149/2009

Nr. 56

26. mai 2010

**Løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í § 20, stk. 6 í løgtingslóg nr. 56 frá 9. juni 2008 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi verður „§ 10, stk. 2“ broytt til: „§ 10, stk. 3“ og „§ 17, stk. 4 og 5“ til: „§ 17, stk. 4 og 6“.

**§ 2**

Hendan løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 173/2009

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705